# Til aðalfundin 2017

Endamál felagsins er at fylkja allar bátaeigarar og bátaáhugaðar, at skipa fyri felags tiltøkum, at veita tænastur til limir eins og vitjandi bátaeigarar og annars tæna áhugamálum limanna innan- sum uttanfelags.

Í trá við hetta hevur nevndin valt at arbeiða við ymiskum til fríðkan og liðugtgerð av húsinum:
Keypt komplett sett av servisu og bestikk - 84 stk - til felagstiltøk og útleigan av húsinum.
Fingið gardinur - Magnina hevur seymað - og vit hava fríðkað hølini við myndum.
Keypt uppvaskimaskinu, sum vaskar skjótt.
Keypt kontainara til at goyma alla útgerð til bryggjudansin- stendur á Hjalla á plássinum hjá Articon.
Keypt nýggjar hurðar,sum tola vatn, á vesunum í erva.
Pussað og olja gólvini. Skullu nú vaskast uttan sápu.
Fingið flott búmerki á húsið.
Fingið brandviðurskiftini góðkend.
Slipsnálirnar eru nú aftur at fáa til keyps.
Bryggjudansurin næsta ár er nú á Nemakalendaranum.
Um ikki øll vita tað, so hevur felagið fingið eitt næstan komplett sett av Álmanakkanum, sum Óli , sáli hevði samlað.
Vit hava sent Býráðnum eitt skriv við áheitan at fara undir bátahylin í Álakeri, sum Tórshavnar havn hevur gjørt upskot til. (Sí tekning)
Á tí fundinum bleiv nevndur tann møguleiki, at limir í bátafelagnum umsótu gestabrúnna í Vágsbotni. Teir skuldu so binda seg í summarmánunum at veita tær tænastur, sum nú einaferð kunnu koma upp á tal. Tað má definerast nærri. Samsýningin skuldi so vera tær inntøkur, sum havnagjaldið gav, at býta ímillum sín. Eg nevni tað her fyri at vita, um nakar áhugi er, og um bátafelagið skal arbeiða meir við málinum.
Vit hava avgjørt at keypa 4 optimistjollur og bjóða upplæring at sigla í teimum, fyri at vekja áhuga hjá børnum og ungum til at sigla. Tær eru ikki keyptar enn, men vit arbeiða við málinum, og vóna, at okkum eydnast fá tær til komandi summar. Limir eru vælkomnir at hjálpa til við tí.
Felagið skipaði fyri *tveimum* siglitúrum: ein við Norðlýsinum í samráð við Birgir 2. juni. Siglt varð líka út um Nólsoynna, so inn í Nólsoy, har vit vitjaðu á Maggies Café og so til deiligt ábit umborð. Debes spældi og lagið var gott. Ein sera hugnaligur túrur. Vónandi kunnu vit gera hann aftur í summar. Og ein túr

til Kollafjarðar bátafelag á lokadegnum. Nakrar fáar tilmeldingar vóru, men túrurin bleiv avlýstur vegna vánaligt veður.
Annars hevur verið skipað fyri teimum føstu tiltøkunum, sum hava verið vælvitjað og væleydnað.
Ársveitslan, sum plagar at vera á Argjum, bleiv avlýst har úti, vegna ov lítla undirtøku. Men bleiv so hildin her í húsinum bert fyri limum. Og tað riggaði sera væl. So fram yvir verður hon her í húsinum.
Hugnanevndin skipaði fyri nøkrum sera hugnaligum tiltøkum, og tað ger hon eisini í vetur, og tað gleða vit okkum til. Skráin er júst løgd á heimasíðuna.
Komandi summar ætlar nevndin veruliga at skipa fyri nøkrum siglitúrum. Tað er ikki fastlagt enn, men tað verður. Limir eru vælkomnir at koma við uppskotum.
Barnatiltakið, sum ikki bleiv seinasta summar, verður uppafturtikið.
Vit ætla bjóða umboðum fyri øllum bátafeløgunum í Føroyum til ein fund. Deils fyri at læra hvønn annan at kenna, og deils fyri at tosa um møguleikar fyri ávísum samarbeiði, t.d. skipa fyri tiltøkum og siglitúrum.
Norsk Havseiler og Krysserklubb hevur spurt seg fyri hjá bátafelagnum, um vit kunnu hjálpa til við nøkrum, sum eitur: Viking Offshore Race 2018, har ca. 25-40 bátar - 35-50 fót - koma á Havnina 7/7-18. Nevndin hevur viðgjørt spurningarnar, og avgjørt at hjálpa til við tí, sum vit halda okkum kunna, m.a. at tey kunnu brúka felagshølini sum samlingsstað.
Vit hava fingið at vita, at vegurin omanfyri ikki verður hækkaður enn, av tí at Tjaldur skal byggja hotelíbúðir har, sum vit hava havt bryggjudans. So vit vita ikki, hvar bryggjudansurin verður næsta ár, um teir byggja ella hava bygt. Men tað fara vit at finna útav.
Felagið fyllir 20 ár 21. febr. næsta ár. Tað verður markerað við onkrum serligum.
Annars verða tey føstu tiltøkini komandi summar.
At enda: komandi ár verður eitt siglingarár!
Og so vilja vit takka limum mangar ferðir fyri ta hjálp, teir hava veitt til húsið, til tiltøk o.ø. felagnum at gagni og vóna, at limir framhaldandi vilja taka eina hond í, tá tað er brúk fyri tí.
Takk fyri.